


*Tað er her á økinum millum Gundadalshøllina og Høllina á Hálsi, at Dansifrøi ætlar at byggja eini felagshús, sum verða umleið 840 fermetrar til støddar.*
*savnsmynd*

# Dansifrøi byggir felagshús í Gundadali

**Á býráðsfundi í kvøld fer Tórshavnar Býráð væntandi at samtykkja at veita felagnum Dansifrøi fíggjarligan stuðul til bygging av felagshúsi í Gundadali**

DANSIHÚS
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Dansifrøi søkti longu fyri fleiri árum síðani um øki og loyvi til at gera ein felagsbygning til felagið og Fimleikafelagið Ljósið, sum tá var við í byggiætlanunum. Ljósið tók seg tó úr samstarvinum nakað seinni, men Dansifrøi hevur seinastu tvey árini arbeitt víðari við málinum einsamalt.

### Byggjast í ítróttarøki

Bygningurin, ið Dansifrøi hevur ætlanir um at byggja, hevur eina gólvvídd, sum er 840 fermetrar. Staðið, ið byggjast skal á, liggur millum Gundadalshøllina og Høllina á Hálsi.

Byggi- og býarskipanarnevndin hjá Tórshavnar Kommunu samtykti í november mánað í fjør at góðkenna verkætlanina og at ganga umsóknini um byggiloyvi á møti.

Dansifrøi hevur eisini søkt Tórshavnar Kommunu um fíggjarligan stuðul til byggingina, sum væntandi fer at kosta umleið 9,5 milliónir krónur. Vanligt hevur verið, at kommunan hevur stuðlað við 30 prosentum av byggikostnaðinum, og landið hevur gjørt tað sama. Men av tí at landið ikki longur stuðlar slíkum byggingum, søkti Dansifrøi um, at stuðul frá kommununi bleiv 60 prosent ístaðin fyri tey vanligu 30 prosentini.

Hesum hava bæði mentamálanevndin og fíggjarnevndin hjá Tórshavnar Kommunu tikið undir, og tí er væntandi, at býráðið í kvøld endaliga samtykkir stuðulin, sum tí verður upp á umleið 5,7 milliónir krónur.

# Nú verða húsini seld

**Í fjør keypti Tórshavnar Kommuna eini sethúshús inni á Gøtu, sum ætlanin var at gera um til barnagarð til børn við serligum tørvi**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá ið kommunan keypti húsini, var tað við tí fyri eyga, at ein stovnur skuldi gerast fyri børn, sum ikki kundu nýta vanligu dagansingartilboðini, ið Tórshavnar Kommuna hevur.

Men kommunan hevur ikki heimild til at útvega børnum við serligum tørvi tilboð um á einum serstovni, tí tað hoyrir undir landið.

### Landið segði nei

Tórshavnar Kommuna hevði síðani fleiri fundir við Almanna- og Heilsumálaráðið, men hagani vóru boðini greið, at eingin slíkur stovnur var settur á stovn í 2006.

Tí var neyðugt hjá Tórshavnar Kommunu at finna okkurt annað at nýta húsini til. Arbeitt hevur verið við ætlanum um at gera eina lítla vøggustovu í húsinum, men hendan ætlan er nú slept.

Umsitingin hjá býráðnum hevur nú mælt til at selja ognina aftur, og hesum hava bæði mentamálanevndin og fíggjarnevndin tikið undir við. Í kvøld verður málið so viðgjørt á býráðsfundi, og væntandi verður nú endaliga samtykt at selja húsini.

